FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14 · Postrúm 272
110 Tórshavn · www.setur.fo

ENDURLÝSING:

# Lektari/adjunktur í støddfrøði

Treytað av játtan á fíggjarlógini fyri 2008 er eitt útbúgvingar- og granskingarstarv í støddfrøði leyst at søkja á Náttúruvísindadeildini (NVD) á Fróðskaparsetrinum. Starvið verður sett sum lektaraella adjunktstarv, treytað av førleika umsøkjarans. Lektarin/adjunkturin skal menna undirvísing og gransking í støddfrøði á Náttúruvísindadeildini.

Útbúgvingarparturin fevnir um fakliga samskipan og um undirvísing í støddfrøðiligum lærugreinum, ið eru í útbúgvingunum á NVD. Á www.nvd.fo er kunning um, hvussu støddfrøði inngongur í bachelorútbúgvingar á NVD.

Granskingarparturin vil í stóran mun vera tengdur at serøki umsøkjarans. Tað er viðkomandi, at umsøkjarin kann vísa á ítøkiligar møguleikar fyri at fremja sína gransking í tilknýti til granskingarumhvørvi á øðrum universitetum.

Væntað verður, at umsøkjarin í ávísan mun kann luttaka í granskingarverkætlanum á NVD, ið krevja støddfrøðiligt innlit.

Umsøkjarar skulu hava PhD førleika innan støddfrøði ella kunna dokumentera, at teir eru um at vera lidnir við sína PhD-verkætlan.

Umsóknarfreistin er 6. juni 2008. Sett verður ein metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi metingina um sín førleika.

Meir fæst at vita um starvið við at venda sær til Hans Paula Joensen, megindeildarleiðara, á teldupostadressu hanspj@setur.fo ella á telefon 352550.

Starvið verður sett frá 1. august 2008. Umsóknir við ævilýsing (curriculum vitae), avritum av próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, serprentum og avritum av vísindaligum ritgerðum (í 4 eintøkum) skulu stílast til niðanfyristandandi adressu.

Fróðskaparsetur Føroya
Setursskrivstovan
J.C. Svabos gøta 14
FO 100 Tórshavn

Náttúruvísindadeildin (NVD) á Fróðskaparsetrinum veitir Bachelor of Science (B.Sc.) útbúgvingar innan lívfrøði, verkfrøði og jarðalisfrøði. Í einstøkum førum ber til at taka Ph.D.-útbúgving. Undirvísingin verður veitt av starvsliðnum á NVD, sum telur 7 fólk, 6 adjungeraðum lektarum/professarum við fakligari ábyrgd av ávísum skeiðum og av umleið 40 uttanseturs undirvísarunum, ið starvast á øðrum stovnum og virkjum í Føroyum og uttanlands. Í løtuni eru 4 Ph.D.-verkætlanir og ein Post. Doc. verkætlan í gongd á NVD. NVD luttekur í granskingarverkætlanum í samstarvi við aðrar stovnar og granskarar bæði innan- og uttanlands.

Sosialurin -har tað hendir

## Umsjónarfólk

Søkt verður eftir umsjónarfólki til skúlar og dagstovnar í Sunda kommunu at byrja sum skjótast.

Talan er um fulltíðarstarv og ynskiligt er, at viðkomandi hevur handverkaraútbúgving. Hetta er tó ikki ein treyt.

**Vit ynskja, at tú:**
- dugir at samstarva og ert fyrikomandi
- er fitt/ur í hondunum
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- kann taka tær av ymsum øðrum fyrifallandi arbeiðsuppgávum

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á teknisku deild, Jógvan Waagstein, tlf. 471027 ella 771027.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **týsdagin 17. juni 2008**, og skulu sendast til:

**Sunda kommunu**
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki

*Sunda kommuna fevnir um bygdirnar Hósvík, Hvalvík, Streymnes, Saksun, Langasand, Haldórsvík, Tjørnuvík, Oyri, Oyrarbakka, Norðskála og Gjógv. Umsjónarfólkini, sum frammanundan eru fimm í tali, taka sær av øllum neyðugum viðlíkahaldi í hesum bygdum, her í millum av skúlum, dagstovnum og øðrum ognum hjá kommununi.*

## Fyrilestur

Áhugaverdur fyrilestur við Svein Femtehjell úr Noregi verður í Læraraskúlahøllini **leygardagin 24. mai kl. 13.30.**

**Fyrilesturin kemur í høvuðsheitum at snúgva seg um tvey evni**
- Hvussu er ítrótturin við til at menna børn og ung
- Hvønn samfelagsligan týdning hevur ítróttur

**Tiltakð er ókeypis og eru øll áhugaði hjartaliga vælkomin**

**Ítróttasamband Føroya**

## Davidsen ættin í Kvívík

**Leygardagin 14. juni** verður skipað fyri samkomu fyri eftirkomarunum hjá Aggusteinus og Biritu Davidsen í Kvívík í sambandi við, at Bertie Davidson úr Kanada, sum er abbasonur Johan Hendrik Davidsen, kemur á vitjan.

Johan Hendrik flutti til Kanada í 1903 og hevur nógvar eftirkomarar har. Johan Hendrik var giftur við Wilhelminu Petersen av Válinum, dóttir Peter Frederik Johannesen og Angeliku f. Reinert.

Hugnaløta við ábiti verður í Glæmuni í Kvívík **14. juni kl. 12**, har skyldfólk og onnur áhugað eru vælkomin.

Tey, ið hava hug at koma, kunnu tekna seg á teldupostadressuni: davidsenfamiljan@gmail.com ella á telefon 257342 ella 255016 **innan 4. juni.**
**Kostnaður 100 kr**

Áhugað kunnu hyggja á heimasíðuna
www.faroeiceland.ca

*Vegna fyrireikararnar*
*Marjun í Gong*

## Ársaðalfundur

Ítróttasamband Føroya hevur ársaðalfund á Hotel Føroyum **24. mei 2007 kl. 10.00.**

Skrá sambært lógum felagsins.

**Ítróttasamband Føroya**

## Klaksvíkar Sjúkrahús

Tlf: 45 45 45 lokal 123
Fax: 45 73 63 · 700 Klaksvík

Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur frá SAHVA, verða á **Klaksvíkar Sjúkrahúsi** 10. og 11. juni 2008 og á **Landssjúkrahúsinum** 12. juni 2008.

Tíð fæst við at ringja á tlf. 45 45 45, mánadag og týsdag kl. 10 - 12, í seinasta lagi týsdagin 3. juni 2008

# Grundstykki til sølu

Grundstykki á 844 m$^2$ í Trongisvági til sølu fyri kr. 90.000,-.

Fleiri upplýsingar fáast við at senda ein t-post til: fs555fs@yahoo.dk